## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt. Týsdagin minkar hann vindin aftur og møguliga regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

Meðalhitin í December var 4,1stig móti 3,8 stig. Avfallið var bert 96 mm, móti 175 mm í meðal yvir 30 ár.

# Jón Brian kært kringvarpsstjóran

**Jón Brian Hvidtfeldt, frásettur tiðindaleiðari í Kringvarpi Føroya hevur kært stjóran til stýrið fyri mannagongdina í sambandi við uppsagnarmálið**

KRINGVARPI FØROYA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í morgun tók Jón Brian Hvidtfeldt, sum varð koyrdur frá sum tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya, avgerðina um at kæra Anniku Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóra til stýrið fyri Kringvarpið.

Stýrið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av Kringvarpinum og at ásetingarnar í kringvarpslógini og øðrum fyriskipanum um virksemi stovnsins verða fylgdar.

Kæran sigur, at Annika Mittún Jacobsen ikki fylgdi røttu mannagongdini í uppsagnarmálinum.

- Í samráð við mínar ráðgevar havi eg í dag gjørt av at kæra formellu mannagongdirnar í samband við uppsagnarmálið, ið eftir okkara tykki eru greitt brot á galdandi sáttmála, sigur Jón Brian Hvidtfeldt.

### Eingin ávaring

Hann er settur eftir sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum og vísir til grein seks í protokollatinum viðvíkjandi uppsøgn:

Um so er, at starvsfólk eftir leiðslunnar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur starvsfólkið í fyrstu syftu at fáa eina munnliga ávaring. Tá ið ávaring verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt.

Eftir hesa munnligu ávaring hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi og send felagnum við nágreiniligari grundgeving.

Tá ið uppsøgn verður givin skal hon sendast viðkomandi skrivliga.

Reglan í hesum protokollati er ikki galdandi, um starvsfólk hevur framt grovt misbrot í tænastuni.

Áðrenn uppsøgn uttan umsókn verður givin, skal stovnurin senda felagnum fráboðan.

Jón Brian Hvidtfeldt fekk ongantíð hvørki munnliga ella skrivliga ávaring, áðrenn hann fekk ætlanarskriv um uppsøgn. Jón Brian Hvidtfeldt hevur eisini biðið stjóran um fleiri skjøl í málinum, tí hann heldur at verandi tilfar í málinum er selektivt, subjektivt og langt frá fullfíggjandi. Somuleiðis biður hann um longda hoyringsfreist, ið annars gongur út mánadagin.

Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, hevur onga viðmerking.



*Jón Brian Hvidtfeldt sigur, at mannagongdin í sambandi við uppsøgnina hevur verið skeiv*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -3 |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -14 |
| Moskva | -18 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -7 |
| Kiev | -12 |
| Bukarest | -5 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 9 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | -- |
| New York | 8 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt;**
Eitt stormlágtrýst, 964 hPa. sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.

**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga vestureftir og grynnist. Brúgvaløgini í útsynning úr Føroyum fara í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/01 kl. 06⁰⁰ – 20/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,9°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/01 kl. 06⁰⁰ – 20/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 57 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

15. januar: Tendring
17. januar: Mánin longst frá jørðini
23. januar: Fyrra kvarter
30. januar: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. jan | 10:32 | 22:51 | 09:32 | 21:51 | 09:47 | 22:06 | 00:13 | 12:32 | 01:13 | 13:32 | 08:47 | 21:06 |
| 22. jan | 11:11 | 23:31 | 10:11 | 22:31 | 10:26 | 22:46 | 00:51 | 13:11 | 01:51 | 14:11 | 09:26 | 21:46 |
| 23. jan | - | 12:06 | 11:06 | 23:40 | 11:21 | 23:55 | 01:31 | 14:06 | 02:31 | 15:06 | 10:21 | 22:55 |
| 24. jan | 00:40 | 13:17 | - | 12:17 | - | 12:32 | 02:40 | 15:17 | 03:40 | 16:17 | 11:32 | - |
| 25. jan | 01:54 | 14:19 | 00:54 | 13:19 | 01:09 | 13:34 | 03:54 | 16:19 | 04:54 | 17:19 | 00:09 | 12:34 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. jan | 07:47 | 20:06 | 10:47 | 23:06 | 11:47 | - | 10:17 | 22:36 | 11:32 | 23:51 |
| 22. jan | 08:26 | 20:46 | 11:26 | 23:46 | 00:06 | 12:26 | 10:56 | 23:16 | - | 12:11 |
| 23. jan | 09:21 | 21:55 | - | 12:21 | 00:46 | 13:21 | 11:51 | - | 00:31 | 13:06 |
| 24. jan | 10:32 | 23:09 | 00:55 | 13:32 | 01:55 | 14:32 | 00:25 | 13:02 | 01:40 | 14:17 |
| 25. jan | 11:34 | - | 02:09 | 14:34 | 03:09 | 15:34 | 01:39 | 14:04 | 02:54 | 15:19 |